# Veðrið



Fimm-daga-forsøgnin frá DMI

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av suðri ella av ymsum ættum og eitt skifti regn,, annars sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Hann veksur vindin upp í skrið ella storm av landsynningi og stundum regn. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi, seinni lækkar hann niður í sunnan og veksur vindin aftur, møguliga til storm. Hitin millum 6 og 10 stig.

# Danir siga nei

*Stóra exit-poll kanningin hjá TV2, sum varð almannakunngjørd klokkan 13 í gjár vísir, at nei-síðan vinnur evruvalið. Men óvissur eru knýttar at forsøgnini*

Magnus Dam
Keypmannahavn

Eru úrslitini í higartil størstu veljarakanningini eftirfarandi, so verður ikki neyðugt hjá dønum at venja seg við, hvussu nógvar evrur ein pakki av mjólk kostar. Sambært kanningini, sum TV2 almannakunngjørdi beint áðrenn blaðið fór til prentingar í gjár, vil ein lítil meiriluti av danska fólkinum varðveita donsku krónuna.

Kanningin er ein sokallað exit-poll kanning og vísir, at 52,5 prosent av velj-arunum siga nei til evruna. 47,5 prosent siga ja. TV2 hevur verið uttanfyri valhølini kring landið og spurt 6297 fólk, hvar tey settu krossin. Hóast hetta ikki er nógv, tá ið hugsað verður um, at meira enn fýra milliónir danir hava atkvøðurætt, so er kanningin tann higartil greiðasta ábendingin um endaliga úrslitið.

Spurningurin er kortini, um kanningin fer at broyta støðuna hjá fólki, sum ikki hava verið á vali enn og sostatt beinleiðis ávirka endaliga úrslitið. Sum vit skriva inni í blaðnum, so finnast politikkarar og serfrøðingar at TV2, tí sjónvarpsstøðin valdi at almannakunngera kanningina, seks tímar áðrenn valhølini lótu aftur.

Óvissan, sum er knýtt at kanningini, er umleið 3 prosent, og sostatt kann endaliga úrslitið broytast til eitt ja. Eisini vísa serfrøðingar á, at fólk, sum starvast í danska vinnulívinum, eru von við at atkvøða seinnapartin, og millum teirra eru fleiri ja-sigarar enn nei-sigarar. Alt hetta ger, at tað skulu sera fáar atkvøður til at flyta endaligu avgerðina frá nei til ja.

Valluttøkan til fólkaatkvøðugreiðsluna í gjár var stór. Tá ið valhølini høvdu verið opin í tríggjar tímar, høvdu 21,7 prosent av veljarunum verið á vali, og tað eru 2,5 prosentstig fleiri enn á ES-atkvøðugreiðsluni fyri tveimum árum síðani. Valserfrøðingar roknaðu í gjár við, at endaliga valluttøkan fór at nærkast 86 prosentum.




*Størsta veljarakanningin, sum higartil er almannakunngjørd, vísir, at nei-síðan við Piu Kjærsgaard og øðrum vinnur evru-valið. Her sæst Pia Kjærsgaard koyra sína nei-atkvøðu í atkvøðukassan*

*Mynd: Nordfoto*




Eitt djúpt lágtrýst, 968 hPa. vestanfyri Írland fer eystureftir og grynnist og brúgvalagið haðani til Føroya fer norðureftir.




Lágtrýstið við Ísland fer norðureftir, men eitt nýtt lágtrýst, sum tekur seg upp eystanfyri New Foundland kemur henda vegin og dýpist nógv.




**Hitalagið mált frá 27./09. kl 06[00]–28./09. kl 06[00]. Hitin í gjár: 10,4°C**
Minsti hiti máldur í september: **÷0,5°** Mesti hiti máldur í september: **19,5°**




Avfallið: 6,0 mm – **mált frá 27./09. kl 6[00]–28./09. kl 06[00]**
Avfallið higartil í september: 102,1 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 3 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 17 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannahavn | 16 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 8 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 15 |
| Bukarest | 16 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 23 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 21 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 23 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 27 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 19 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 16 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 22 |


sosialurin
www.sosialurin.fo

TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG



12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes


## Vestfalskyrrindi

24. sept.: Mánin næstur jørðini
27. sept.: Tendring
5. okt.: Fyrra kvarter
6. okt.: Mánin longst frá jørðini

Kelda: Skipalistin 2000

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 29. sept. | 08.10 | 20.27 | 07.10 | 19.27 | 07.25 | 19.42 | 10.10 | 22.27 | 11.10 | 23.27 | 06.25 | 18.42 | 05.25 | 17.42 | 08.25 | 20.42 | 09.25 | 21.42 | 07.55 | 20.12 | 09.10 | 21.27 |
| 30. sept. | 08.43 | 21.01 | 07.43 | 20.01 | 07.58 | 20.16 | 10.43 | 23.01 | 11.43 | – | 06.58 | 19.16 | 05.58 | 18.16 | 08.58 | 21.16 | 09.58 | 22.16 | 08.28 | 20.46 | 09.43 | 22.01 |
| 1. okt. | 09.20 | 21.38 | 08.20 | 20.38 | 08.35 | 20.53 | 11.20 | 23.38 | 00.01 | 12.20 | 07.35 | 19.53 | 06.35 | 18.53 | 09.35 | 21.53 | 10.35 | 22.53 | 09.05 | 21.23 | 10.20 | 22.38 |
| 2. okt. | 09.58 | 22.15 | 08.58 | 21.15 | 09.13 | 21.30 | 11.58 | – | 00.38 | 12.58 | 08.13 | 20.30 | 07.13 | 19.30 | 10.13 | 22.30 | 11.13 | 23.30 | 09.43 | 22.00 | 10.58 | 23.15 |